# Kristian saknar konsekvens

**Ongin skilagóð orsøk er at geva gjald- og kredittkortum serrætt fram um t.d. eina GjaldSkipan. Tað sigur Kristian Magnussen, sum saknar konsekvens í handfaringini hjá Høgna Hoydal í málinum um vernd av persónsupplýsingum**

DATAVERND
*Ingi Rasmussen*

– Lóggávan má vera konsekvent, og tí gevur hetta onga meining.

Tað sigur Kristian Magnussen løgtingsmaður, nú Høgni Hoydal ætlar at geva FR/VISA-kortunum undantak, samstundis sum hann herðir kunngerðina um vernd av persónsupplýsingum.

Høgni Hoydal hevur í hyggju at gera eina nýggja kunngerð, so peningastovnarnir ikki flyta upplýsingar av landinum í sambandi við eina nýggja GjaldSkipan, sum teir eru farnir undir í samstarvi við Pengeinstitutternes Betalings System. Samstundis lovar hann kortini, at gjald- og kredittkortini eru trygg, hóast upplýsingar eisini tá vera fluttir av landinum. Tað hevur Kristian Magnussen, sum er ímóti, at landsstýrismaðurin yvirhøvur grípur inn í málið, ilt við at skilja.

## Eymar upplýsingar

Ongi saklig atlit liggja til grund fyri, at bara FR/VISA-kort skulu vera undantikin, heldur løgtingsmaðurin hjá Javnaðarflokkinum.

– Øll mugu vera líka fyri lógini. Tað er ikki logiskt, at FR/VISA-kortini sleppa undan, um peningastovnarnir ikki sleppa at nýta GjaldSkipanina í samstarvi við PBS. Tað eru nógv eymari upplýsingar knýttir at einum FR/VISA-korti, sum kunnu misnýtast, um tað kemur á skeivar hendur, sigur Kristian Magnussen.

Dataeftirlitið hevur givið Elektron loyvi at flyta upplýsingar av landinum í sambandi við nýggju GjaldSkipanina. Kristian Magnussen sigur, at eftirlitið fær stórar trupulleikar, um Høgni Hoydal nú blandar seg.

– Meginreglan er, at upplýsingar skulu vera í landinum, men Dataeftirlitið er suverent á økinum og hevur givið eitt undantak við GjaldSkipanini. Um Dataeftirlitið nú fær at vita frá landsstýrismanninum, at FR/VISA-kortini skulu vera undantikin, men ikki GjaldSkipanin, so hevur eftirlitið eitt stórt problem. Tí hvørjum atlitum skulu teir so virka eftir? spyr Kristian Magnussen.

## Bara eitt atlit

Um onnur atlit enn at verja persónsupplýsingar liggja til grund fyri avgerðini hjá Høgna Hoydal, so eiga tey at vera søgd alment, heldur Kristian Magnussen.

– Lóggávan má vera konsekvent. Dataeftirlitið kann ikki sita og viga eftir serligum føroyskum áhugamálum, tí so koma teir út á eina glíðubreyt, sigur Kristian Magnussen.

Høgni Hoydal tvíheldur um, at hann bara ger eftir tingsins vilja, nú hann ætlar at herða kunngerðina um vernd av persónsupplýsingum. Men tá tingið viðgjørdi málið mikudagin, gjørdu framsøgumenn vart við, at hann ikki umboðar teirra vilja. Sostatt er líkt til, at landsstýrismaðurin stendur rættiliga einsamallur við sínari ætlan at herða lógina.






# Jólahugni á Torginum í SMS

**Fríggjadagin og leygardagin skipar Amnesty International fyri jólahugna og sølu av Amnesty ljósum á Torginum í SMS**

JÓLAHUGNI
*Tíðindaskriv*

Eitt av afturvendandi jólatiltøkunum á Torginum í SMS hevur verið sølan av Amnesty ljósum, sum Amnesty International, Føroya Deild, hevur skipað fyri á hvørjum ári um hesa tíðina.

Í ár verður einki undantak, tó at tey frá Amnesty í ár hava gjørt tiltakið meir umfatandi. Saman við stóra jólabýnum, sum er á Torginum, fara tey at seta upp eina lítla café, har tey, umframt at selja Amnesty ljós, fara at selja jólakort, gløgg, holukøkur og okkurt til børnini. Á hendan hátt vóna tey, at tey vitjandi í SMS hesar báðar dagarnar, fara at steðga á eina løtu, fáa sær gløgg og holukøkur, og harvið veita Amnesty International ein stuðul, og eisini geva sær stundir at kunna seg um nakað av arbeiðnum hjá felagsskapinum. Tí umframt café'ina verður ein lítil framsýning um stóra Russlands átakið hjá Amnesty International.

Tiltakið hjá Amnesty í SMS letur upp fríggjadagin kl. 13.00 er opið til kl. 19.00. Leygardagin lata tey upp kl. 10.00 og hava opið til handlarnir lata aftur kl. 14.00.

# Stórt jólatiltak fyri børn

**Stórt jólatiltak fyri børn verður í KFUM leygardagin 7. desember. Á skránni verður m. a. kappingar, jólasjónleikur, tensing kórið í KFUM syngur, og at enda koma jólamenn við gávum**

JÓLATILTAK
*Tíðindaskriv*

Møguleiki verður hjá foreldrum at keypa sær kaffi og køkur, meðan børnini hugna sær. Eisini fer Bókadeild KFUMs at hava ein lítlan bás har tey selja bøkur.

Tiltakið er til frama fyri ferð hjá kórinum í KFUM, Sound of Glory Tensing, til Prag har stór ungdómsstevna verður hildin næsta summar. Kostnaðurin er 25 kr. fyri hvønn, og skráin sæst á heimasíðu hjá kórinum: www.soundofglory.com

Øll eru vælkomin, heilsa fyrireikararnir.


# Vikuskifti

Nr. 236 • leygardagur • 7. desember 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


## Filmarnir í heyst

-Kaurismäki, Leigh, Almodóvar og meiri Dogme. Nakrir av heimsins bestu filmum eru frammi í heyst. Kim Simonsen ummælir



**Lesið síðu 6 og 7**



*Við øllum sansum uttnaná verður gingið eftir haru. Hon boðar ikki frá frammanundan, nær hon er har*

# Harutíð

Tað er harutíð. Menn ganga við byrsu í haganum, og skotini runga millum fjøllini. Haran er eitt jakstrað stakkaladýr hesa tíðina, men ymiskt er, hvussu hevur gingið við veiðuni

HARUVEIÐA
*Orð og mynd: Edvard Joensen*

Allahalganna er farin afturum, og nú er tíð at skjóta haru, hetta til nýggjárs. Nógvir mans ganga við byrsu í haganum, men ymiskt er, hvussu veiðan eydnast.

Vit fara ein túr í morgin. Teir hava verið fyrstu ferð, men tað gekk einki soleiðis. Fingu bara ein part av tí, teir plaga at fáa fyrsta dag. Tað man vera veðrið, sum ger tað, halda teir, tí ættin hevur verið ólagalig í einar fjúrtan dagar nú.

So er at gera klárt. Finna útgerðina fram. Byrsa og patrónir eru til reiðar. Ein fetil má havast við, um tað skuldi hent, at tú møtti eini haru. Og tað skuldi tú helst, tá soleiðis er.

Leygarmorgun. Tað fer eitt lot út eftir vágni, men tað er líkasum minkandi. Nakað kølið er, so kanska er frost í fjallinum. Men eingin kavi soleiðis kortini. Eitt følv um tindin.

Vit taka brekkuna beint upp. Royna at koma okkum niðan við markinum heimantil og ganga so norður gjøgnum Reynini, tosa teir, sum staðkendir eru. Og tað skuldi ligið væl fyri í dag, tí tað kemur ein høgættarond heimeftir, so vit ganga móti tí loti, sum er. Tað hjálpir eisini, tá tú hevur við skapning at gera, sum hoyrir so væl sum hara.

Teir vita av einari, sum situr inni hjá grannanaum eitt sindur heiman fyri markið. Tað ber ikki til at skjóta hana, hóast hon tykist sita rímilig føst. Og ikki fæst hon forskrekt so heldur, at hon kemur um mark til okkara. Fer heldur hinvegin, sum vera man. Annars er einki at síggja niðan gjøgnum undirhagan til vit koma í Reynini.

So skipa teir seg av nýggjum. Nýbyrjarin skal ganga í miðuni norður eftir røðini, og so teir báðir royndu hvør sínu megin. Annar beint undir, og hin ovari á.

Her skuldi verið góð leið, men teir láta einki at. Lítið var at síggja, tá teir vóru tann fyrra dagin.

So verður farið. Spakuliga við øllum sansum spentum. Lendið er »haruligt«, sum tikið verður til. Grýtugt. Klettar við steinum ímillum. Fleiri glopur og hol, har ein hara kann goyma seg.

Tað er at stíga varliga. Syrgja fyri sum mest at stíga á klettin. Eitt sindur av frosti er her í erva, og tað brakar, har vátt hevur verið undir.

Síggi bara tann ovara mannin í løtuni. Hin er farin omanav, men man fara at koma undan aftur, tá eg komi longri norður.

Komi út á ein lítlan hamara, og har livir undir. So er at vera knappur og fáa hana.

Hon fer undan og er á veg runt klettin. Sleppur hon runt, havi eg mist hana. Men hon er nær, og kann skjótt fara í knús, um eg skjóti. Men har er einki at gera.

Spenningurin er øgiligur, merktist aftaná. Tí tey sekundini alt hetta vardi, varð ikki hugsað.

Skotið smellur og hon steindoyr. Eitt skot er eftir, og tað er at hyggja seg um, um nú ein onnur er onkunstaðni og loypur, tá tað brestur, Men eg síggi einki.

Taki úr og løði aftur og fari niður av efti haruni, sum har liggur.

Síggi tann niðara mannin aftur, hann peikar. Haldi, at hann hevur sæð eina aðra og fari lúrandi kring klettin. Men har er einki. Tað var mest ein heilsan frá hansara síðu.

Meðan eg fatli, brestur eitt skot niðanfyri. Nú eru tær tættar, letur til. Og ikki eri eg meira enn farin til gongu, so skjýtur hann oman fyri eisini.

Nú hava allir fingið hvør sína innan fyri einar fýra-fimm minuttir. Hetta verður dagur í viku, hugsa ivaleyst allir í felag.

Men vit ganga. Fara allan hagan á tamb, men síggja bara onkra hendinga haru fleiri mál burtur.

Ikki fyrr enn komið verður út aftur undir fjallinum heilt í erva, er ein, sum kemur so frægt í mál, at tann ovasti maðurin heldur seg til at skjóta. Hann fær hana, so nú eru tær fýra.

Og har við verður tað. Hóast líkindini nú eru frálík, stendur púra einki til við haru haganum. Umframt tær fýra, vit fingu, vóru fimm aðrar at síggja. Tað var alt. Og eingin soleiðis í máli, at tú kundi siga, at hasa átti tú at fingið.

Men tann vælsignaði túrur. Bara tað at ganga millum fjøllini ein slíkan dag, vigar ríkiliga upp fyri tað, at úrtøkan ikki er nakað at reypa av.

Men hinumegin skjóta teir dúgliga. Tað ljóðar sum í Kosovo. Annaðhvørt er øgilig nógv hara har undan ættini, ella raka teir øgiliga illa.

Men hetta tekur ikki mótið kortini. Gera beinanveg av at fara avstað aftur, fyrsta høvið býðst. Goldið er fyri hagan, og so er at brúka ræ ttin, meðan hann er.